Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	28.03.2023
Mál nr.:	23/03971
Málsviðgjørt:	DH/JS
Ummælistíð:	09.03.2023 - 16.03.2023
Eftirkannað:	20. mars 2023/20. mars 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)
(Dagføring av gjøldum, veiðigjald fyri lodnu og heystgýtandi sild og strikan av undantaki fyri heimaflotan)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin), verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 1.** Eigari av fiskifari, undir føroyskum flaggi, sum veiðir av rættindum, Føroyar ráða yvir, skal rinda veiðigjald av veiðu av makreli, sild, lodnu, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum."

2. § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** Veiðigjald skal ikki rindast av veiðu, tá rættindini at veiða eru keypt á uppboðssølu, og uppboðssølugjald skal rindast fyri kvotuna."

3. Í § 3 verður sum nr. 2 sett:
"2) Sild: norðhavssild og heystgýtandi sild."

4. § 5 verður orðað soleiðis:

"**§ 5.** Veiðigjald á makrel, sild, lodnu og svartkjaft verður roknað eftir ásetingunum í § 9, stk. 1, 2 og 4 og verður lagt á veiðu, landað 1. august til og við 31. juli.
Stk. 2. Á hvørjum ári, seinast 15. juli, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð veiðigjald fyri makrel, sild, lodnu og svartkjaft, sum skal vera galdandi 1. august til og við 31. juli árið eftir, samanber tó § 7, stk. 2."

5. § 7, stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Er talan um kvotu av makreli, sild, lodnu ella svartkjafti, ásetir landsstýrismaðurin í seinasta lagi 15. juli í kunngerð veiðigjaldið sambært stk. 1, sum skal vera galdandi frá 1. august til og við 31. desember."

6. § 9 verður orðað soleiðis:

"**§ 9.** Veiðigjaldið er tað í skjali 1, 1A og 1B ásetta prosentið av miðal avgreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.
Stk. 2. Miðal avreiðingarvirðið fyri makrel, sild og svartkjaft verður gjørt upp fyri hvørt fiskaslag sær. Uppgerðin verður gjørd við støði í avreiðingarprísum og nøgdum í rundari vekt fyri nevndu fiskasløg, sum fiskifør undir føroyskum flaggi landa feskt óvirkað, og sum eru avreidd og fráboðað Vørn 1. juli árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, og til og við 30. juni sama ár, veiðigjaldið skal áleggjast.
Stk. 3. Fyri botnfisk í Barentshavinum verður miðal avreiðingarvirðið gjørt upp við støði í prísum og nøgdum av toski í rundari vekt, sum er seldur á almennari uppboðssølu í Føroyum frá 1. desember annað árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, til og við 30. november árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast. Selda nøgdin av fiski og fiskavøru skal umroknast til runda vekt eftir ásetingunum um umrokningarfaktorar, ásettir við heimild í løgtingslóg um sjófeingi.
Stk. 4. Miðal avreiðingarvirðið fyri lodnu verður gjørt upp við støði í avreiðingarprísum og nøgdum í rundari vekt, sum fiskifør undir føroyskum flaggi landa feskt óvirkað, og sum eru avreidd og fráboðað Vørn 1. mai árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, og til og við 30. apríl sama ár, veiðigjaldið skal áleggjast."

7. Aftan á § 9, men áðrenn yvirskriftina yvir § 10, verður sett:

"**§ 9 a.** Fyri veiðu av makreli, norðhavssild og svartkjafti, ið er landað frá 1. august 2022 til og við 31. juli 2023, er veiðigjaldið tað í skjali 1, talvu 1-3 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.
Stk. 2. Fyri veiðu av botnfiski í Barentshavinum, ið er landað frá 1. januar 2022 til og við 31. desember 2023, er veiðigjaldið tað í skjali 1, talvu 4 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt.

§ 9 b. Fyri veiðu av makreli, sild, lodnu og svartkjafti, ið er landað frá 1. august 2023 til og við 31. juli 2026, er veiðigjaldið tað í skjali 1A, talvu 1 og 2 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.
Stk. 2. Fyri veiðu av botnfiski í Barentshavinum, ið er landað frá 1. januar 2024 til og við 31. desember 2025, er veiðigjaldið tað í skjali 1A, talvu 3 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt.

§ 9 c. Fyri veiðu av makreli, sild, lodnu og svartkjafti, ið er landað frá 1. august 2026, er veiðigjaldið tað í skjali 1B, talvu 1 og 2 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.
Stk. 2. Fyri veiðu av botnfiski í Barentshavinum, ið er landað frá 1. januar 2026, er veiðigjaldið tað í skjali 1B, talvu 3 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt.

§ 9 d. Veiðigjald eftir hesi løgtingslóg verður ikki rindað av veiðu, sum ikki kann seljast vegna ótilætlaða hending, sum fer fram áðrenn avreitt verður.”

8. § 11 verður orðað soleiðis:

“**§ 11.** Vørn skal í seinasta lagi 5. juli á hvørjum ári lata landsstýrismanninum upplýsingar um prís og nøgd í rundari vekt av makreli, sild, lodnu og svartkjafti, sum fiskifør undir føroyskum flaggi hava landað feskt óvirkað, og sum er avreidd og fráboðað Vørn 1. juli árið frammanundan til og við 30. juni.”

9. Í § 12, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Veiðigjald fyri lodnu, ið er landað 1. mai árið frammanundan og til og við 30. apríl, fellur til gjaldingar 15. juli.”

10. Aftan á § 12 verður sett:

“**§ 12 a.** 2% av veiðigjaldinum fellur til kommunurnar.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkurnar frá gjaldinum verða býttar millum kommunurnar.”

11. Skjal 1 í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap verður orðað sum ásett í skjali 1.

12. Skjal 2 verður sett sum skjal 1A og 1B í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 12a kemur í gildi 1. januar 2024.

Skjal 1

“**Skjal 1**

Veiðigjaldstalvur

Talva 1: Svartkjaftur

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiðigjald
Frá og við	til	%
0,00	1,30	11%
1,30	1,50	12%
1,50	1,70	13%
1,70	1,90	14%
1,90	2,10	15%
2,10	2,30	16%
2,30		17%

Talva 2: Norðhavssild

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiðigjald
Frá og við	til	%
0,00	2,50	15,5%
2,50	3,00	16,0%
3,00	3,50	16,5%
3,50	4,00	17,0%
4,00	4,50	17,5%
4,50	5,00	18,0%
5,00	5,50	18,5%
5,50	6,00	19,0%
6,00		19,5%

Talva 3: Makrelur

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiðigjald
Frá og við	til	%
0,00	6,00	17,5%
6,00	6,50	18,0%
6,50	7,00	18,5%
7,00	7,50	19,0%
7,50	8,00	19,5%
8,00	8,50	20,0%
8,50	9,00	20,5%
9,00	9,50	21,0%
9,50		21,5%

Talva 4: Botnfiskur

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiðigjald
Frá og við	til	%
0,00	13,50	2,50%
13,50	14,00	2,75%
14,00	14,50	3,00%
14,50	15,00	3,25%
15,00	15,50	3,50%
15,50	16,00	3,75%
16,00	16,50	4,00%
16,50	17,00	4,25%
17,00	17,50	4,50%
17,50	18,00	4,75%
18,00		5,00%

”

Skjal 2

“**Skjal 1A**

Veiðigjaldstalvur

Talva 1: Svartkjaftur

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiði-gjald
Frá og við	til	%
0,00	1,00	0%
1,00	1,20	5%
1,20	1,40	10%
1,40	1,60	14%
1,60	1,80	15%
1,80	2,00	16%
2,00	2,20	17%
2,20	2,40	18%
2,40	2,60	19%
2,60	2,80	20%
2,80	3,00	21%
3,00	3,20	22%
3,20	3,40	23%
3,40		24%

Talva 2: Makrelur, sild og lodna

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiði gjald
Frá og við	til	%
0,00	2,00	0%
2,00	2,50	8%
2,50	3,00	10%
3,00	3,50	12%
3,50	4,00	14%
4,00	4,50	16%
4,50	5,00	18%
5,00	5,50	19%
5,50	6,00	20%
6,00	6,50	21%
6,50	7,00	22%
7,00	7,50	23%
7,50	8,00	24%
8,00	8,50	25%
8,50	9,00	26%
9,00	9,50	27%
9,50	10,00	28%
10,00	10,50	29%
10,50	11,00	30%
11,00	11,50	31%
11,50	12,00	32%
12,00	12,50	33%
12,50		34%

Talva 3: Botnfiskur

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiði-gjald
Frá og við	til	%
0,00	13,50	2,75%
13,50	14,00	3,00%
14,00	14,50	3,25%
14,50	15,00	3,50%
15,00	15,50	3,75%
15,50	16,00	4,00%
16,00	16,50	4,25%
16,50	17,00	4,50%
17,00	17,50	4,75%
17,50	18,00	5,00%
18,00	18,50	5,25%
18,50	19,00	5,50%
19,00	19,50	5,75%
19,50	20,00	6,00%
20,00	20,50	6,25%
20,50	21,00	6,50%
21,00	21,50	6,75%
21,50	22,00	7,00%
22,00	22,50	7,25%
22,50	23,00	7,50%
23,00	23,50	7,75%
23,50	24,00	8,00%
24,00	24,50	8,25%
24,50	25,00	8,50%
25,00	25,50	8,75%
25,50		9,00%

Skjal 1B

Veiðigjaldstalvur

Talva 1: Svartkjaftur

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiði-gjald
Frá og við	til	%
0,00	1,00	0%
1,00	1,20	7%
1,20	1,40	12%
1,40	1,60	16%
1,60	1,80	17%
1,80	2,00	18%
2,00	2,20	19%
2,20	2,40	20%
2,40	2,60	21%
2,60	2,80	22%
2,80	3,00	23%
3,00	3,20	24%
3,20	3,40	25%
3,40		26%

Talva 2: Makrelur, sild og lodna

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiði-gjald
Frá og við	til	%
0,00	2,00	0%
2,00	2,50	10%
2,50	3,00	12%
3,00	3,50	14%
3,50	4,00	16%
4,00	4,50	18%
4,50	5,00	20%
5,00	5,50	21%
5,50	6,00	22%
6,00	6,50	23%
6,50	7,00	24%
7,00	7,50	25%
7,50	8,00	26%
8,00	8,50	27%
8,50	9,00	28%
9,00	9,50	29%
9,50	10,00	30%
10,00	10,50	31%
10,50	11,00	32%
11,00	11,50	33%
11,50	12,00	34%
12,00	12,50	35%
12,50		36%

Talva 3: Botnfiskur

Fiskaprísur í kr./kg.		Veiði-gjald
Frá og við	til	%
0,00	13,50	4,75%
13,50	14,00	5,00%
14,00	14,50	5,25%
14,50	15,00	5,50%
15,00	15,50	5,75%
15,50	16,00	6,00%
16,00	16,50	6,25%
16,50	17,00	6,50%
17,00	17,50	6,75%
17,50	18,00	7,00%
18,00	18,50	7,25%
18,50	19,00	7,50%
19,00	19,50	7,75%
19,50	20,00	8,00%
20,00	20,50	8,25%
20,50	21,00	8,50%
21,00	21,50	8,75%
21,50	22,00	9,00%
22,00	22,50	9,25%
22,50	23,00	9,50%
23,00	23,50	9,75%
23,50	24,00	10,00%
24,00	24,50	10,25%
24,50	25,00	10,50%
25,00	25,50	10,75%
25,50		11,00%

”

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Samgongan hevur sett sær fyri, at tilfeingisgjøldini í uppsjóvarvinnuni og flotanum í Barentshavinum verða endurskoðað, soleiðis at ein munandi, men rímiligur partur av tí serstaka vinninginum – tilfeingisrentuni – sum vinnulig serrættindi kunnu hava við sær, falla til landið. Støðið á verandi veiðigjøldum í verandi lóggávu er ásett, soleiðis at veiðigjaldsinntøkan svaraði til støðið í 2018. Við hesum uppskotinum ynskir samgongan at betra um verandi skipan, við at stilla avgjaldsstigar og gera skipanina meira javna og gjøgnumskygda.

Í arbeiðinum til at evna verandi veiðigjaldslóg, skrivaði arbeiðsbólkurin, sum var mannaður við umboðum fyri vinnu og fyrisiting, at sum meginregla eigur sama gjald at verða rindað fyri sama fiskaslag, fyri at gjaldið ikki skal vera vinnuliga skeiklandi og ikki skal virka sum ein eyka skattur. Sí tilmæli um skipan fyri veiðigjøld frá 2021 og frameftir (lm-136/2020).

1.2. Galdandi lóggáva

Í dag verður veiðigjald goldið eftir løgtingslóg um veiðigjald (veiðigjaldslógin), umframt at goldið verður uppboðssølugjald fyri 8-ára rættindi, sum vórðu seld í 2018 og 2019. Í 2026 og 2027 verða 8-ára rættindini umløgd til varandi rættindi, og verður veiðigjald eftir veiðigjaldslógini tá at rinda av hesum rættindum.

Undantak er fyri sonevnda heimaflotanum, sum eftir galdandi veiðigjaldslóg ikki skal rinda veiðigjald. Kvotur latnar fiskiførum við fiskiloyvi til fiskiskap við gørnum eftir havtasku og svartkalva á føroysku landleiðunum eru somuleiðis undantiknar.

Skipanin fyri makrel, norðhavssild og svartkjaft

Veiðigjald er á hvørt fiskaslag, har goldið verður fyri hvørt fiskað kilo. Gjaldið verður kunngjørt í juli at vera galdandi frá 1. august til og við 31. juli árið eftir.

Grundarlagið fyri veiðigjaldinum er miðal avreiðingarprísurin fyri óviðgjørdan, feskan makrel, norðhavssild og svartkjaft, sum føroysk skip hava avreitt í tíðarskeiðnum 1. juli til 30. juni árið fyri. Ítøkiliga merkir hetta, at bert avreiðingar hjá RSW-skipum (refrigerated sea water) verða roknaðar upp í grundarlagið. Hinvegin verða skip, sum virka veiðuna umborð, ikki tikin við. Á tann hátt verður veiðigjaldið ikki ávirkað av, at fiskur verður virkaður umborð.

Dømi:

Makrelprísurin av óvirkaðum makreli frá 1. juli 2021 til 30. juni 2022 var 6,63 kr./kg

Sambært skjali 1 verður veiðigjaldið tá 18,5%.

Veiðigjaldið frá 1. august 2022 til 31. juli 2023 bleiv tískil roknað soleiðis:

6,63kr./kg x 18,5% = 1,23 kr./kg.

Skipanin fyri botnfisk í Barenthavinum og við Svalbard:

Veiðigjaldið verður ásett at galda frá 1. januar til og við 31. desember grundað á miðalprísir á fiskamarknaðinum frá 1. desember til 30. november árið fyri.

Av tí, at fá føroysk skip fiska botnfisk í Barentshavinum og við Svalbard, varð ikki mett umboðandi at nýta avreiðingarprísir sum grundarlag undir gjaldinum á sama hátt sum við uppsjóvarfiski. Harumframt hava skipini í fleiri førum ymiskar framleiðslur umborð, og tí kundi eitt veiðigjald, sum varð tongt at avreiðingarvirðinum, skeiklað valið millum virðisøkjandi virking umborð og á landi. Eisini verður meira torgreitt hjá myndugleikanum at hava eftirlit við ymsum umrokningarfaktorum.

Hóast fiskiskapur eftir toski í Barentshavinum og við Svalbard ikki beinleiðis kann samanberast við fiskiskap eftir toski undir Føroyum, varð mælt til at brúka miðal avreiðingarprísin á toski á Fiskamarknaði Føroya sum grundarlag fyri áseting av veiðigjaldinum, har prísurin verður umroknaður til krónur fyri hvørt kilo av rundum fiski.

Toskur er tann størsti parturin (umleið 85 %) av botnfiskakvotuni í Barentshavinum og við Svalbard, og tí verður avgjaldið fyri tosk eisini nýtt sum avgjald fyri annan botnfisk, hóast toskaprísurin vanliga hevur tann hægsta miðalprísin fyri hesi fiskasløg.

Yvirskipað verður verandi skipan mett at virka væl. Skipanin er einføld, løtt at umsita og vinnan veit, hvat veiðigjaldið er, tá farið verður til fiskiskap.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at dagføra verandi veiðigjøld. Mett verður, at virðið á veiðirættindunum er nakað størri, enn tey gjøld, sum eru í dag. Somuleiðis leggur uppskotið upp til at strika undantakið hjá heimaflotanum fyri at rinda veiðigjald, og harvið avtaka tann vinnustuðulin, sum verður latin gjøgnum ókeypis kvotur.

Endamálið við uppskotinum er somuleiðis at gjaldast skal fyri veiðirættindi til at fiska lodnu og heystgýtandi sild, sum í dag ikki rinda veiðigjald.

Harafturat verður veiðigjaldið fyri botnfiski í Barentshavinum og við Svalbard dagført, so at tað í størri mun stendur mát við virðið á tí býti, sum Føroyar gera við Russland, um atgongd til botnfisk í barentshavinum.

Sambært uppskotinum hækkar veiðigjaldið í 2026, soleiðis at samlaða inntøkan ikki minkar, tá uppboðsølukvotur í 2026 og 2027 fara frá at rinda veiðigjald.

Inntøkur til kommunurnar

Skotið verður upp, at 2% av veiðigjaldinum fellur til kommunurnar. Sambært uppskotinum ásetur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nærri reglur um, hvussu peningurin frá gjaldinum verður býttur millum kommunurnar. Býtið verður ásett við støði í eini útrokning av lækkingini í inntøkuni frá partafelagsskatti í teimum kommunum, sum fáa lægri partafelagsskatt vegna broyting í veiðigjøldum í hesum lógaruppskoti. Meginreglurnar í kap. 4 og 5 í skattalógini um tilhalds- og atvinnukommunur verða nýttar sum ein treyt í býtinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Veiðigjald fyri heystgýtandi sild

Í uppskotinum verður sild nágreinað sum norðhavssild og heystgýtandi sild. Á tann hátt skal rindast veiðigjald fyri heystgýtandi sild, sum í dag einki veiðigjald skal rindast av. Heystgýtandi sild er serføroyskur stovnur av sild, men líkist nógv norðhavssild. Tískil verður frameftir sama veiðigjald fyri alla sild.

Dagføring av veiðigjaldstalvum fyri uppsjóvarfisk

Við broytingini verða veiðigjaldstalvurnar fyri makrel og sild lagdar saman. Fyri veiðu av makreli og norðhavssild, ið er landað frá 1. august 2022 til og við 31. juli 2023, er tó eingin broyting.

Fyri veiðu landað frá 1. august 2023 verður talvan fyri makrel og sild longd og gjørd meira stigvaksandi soleiðis, at veiðigjaldið hækkar skjótari, tá ið prísurin hækkar, og somuleiðis lækkar skjótari, tá ið prísurin lækkar. Við broytingini verður gjaldið lægri enn tað er í dag, tá prísurin er lágur og hægri, tá prísurin er høgur.

Í verandi talvum er gjaldið lægri á makreli enn á sild. Við samanleggingini verður gjaldið serliga hækkað fyri makrel. Mett verður, at ein størri tilfeingisrenta er knýtt at rættindunum til at veiða makrel, sum ítøkiliga kemur til sjóndar gjøgnum teir handlar, har sonevndi heimaflotin selur makrelrættindi til nótaskip.

Verður støðið tikið í verandi gjøldum á uppsjóvarfiski, sæst munurin á verandi og nýggja gjaldinum í talvuni niðanfyri.

	Miðalprísur- 21/22 (kr./kg.)	Veiðigjald (kr./kg.)	Nýtt veiðigjald (kr./kg.)
makrelur	6,63	1,23	1,46
norðhavssild	4,96	0,89	0,89
heystgýtandi sild	4,96	0,00	0,89
svartkjaftur	2,05	0,31	0,31
lodna	5,17	0,00	0,98
botnfiskur	21,60	1,08	1,51

Undantakið fyri heimaflotan verður strikað

Í arbeiðinum til at evna verandi veiðigjaldslóg, skrivaði arbeiðsbólkurin, sum var mannaður við umboðum fyri vinnu og fyrisiting, at sum meginregla eigur sama gjald at verða rindað fyri sama fiskaslag, fyri at gjaldið ikki skal vera vinnuliga skeiklandi og ikki skal virka sum ein eyka skattur. Arbeiðsbólkurin tók ikki ítøkiliga støðu til, um sama veiðigjald skal leggjast á heimaflotan sum á aðrar skipabólkar.

Við lógarbroytingini verður frítøkan fyri at rinda veiðigjald hjá heimaflotanum strikað. Harvið skulu øll, sum fáa makrelkvotu, rinda sama veiðigjald.

Hækking av gjaldinum fyri botnfisk í Barentshavinum

Fyri at Føroyar kunnu fiska í russiska partinum av Barentshavinum, lata Føroyar Russlandi uppsjóvarfisk í føroyskum sjógvi. Veiðigjaldið, sum Føroyar í dag fáa fyri fiskiskap í russiska

partinum av Barentshavinum, er nógv minni enn tað, sum Føroyar høvdu fingið, um vit ikki lótu uppsjóvarfisk til Russland. Tí verður mett rímiligt, at veiðigjaldið í Barentshavinum hækkar.

Talvan niðanfyri vísir veiðigjaldsvirðið á avtaluni við Russland fyri 2023 við teimum veiðigjøldum, sum eru galdandi í dag.

		tons	kr/kg	veiðigjald
til Russlands	makrelur	13.000	1,23	15.990
	sild	8.500	0,89	7.565
	svartkjaftur	72.000	0,31	22.320
				45.875
til Føroyar	toskur	12.285	1,08	13.268
	hýsa	1.276	1,08	1.378
	flatfiskur	900	1,08	972
	rækjur	4.000	0	-
				15.618

Brúka vit miðalprísir, frá tí at veiðigjøldini vórðu ásett, er grundarlag fyri, at gjaldið fyri botnfisk í Barentshavinum trífaldast. Hækkingin er sostatt ikki so stór, at veiðigjaldsvirðið í russlandsavtaluni javnvigar eftir hesa broyting.

Veiðigjald fyri lodnu
Við uppskotinum verður eisini veiðigjald rindað fyri veiðu av lodnu. Gjaldið verður ásett í somu talvu sum fyri makrel og sild. Lodna verður vanliga fiskað í januar, februar og mars og ofta verður kvotan hækkað bæði í januar og februar. Hesi serligu viðurskifti hava við sær, at stór sveiggj kunnu verða bæði í kvotu og prísi. Vanligu reglurnar um áseting av veiðigjaldi út frá miðalprísum árið fyri eru tí ikki so væl egnaðar til lodnu. Tí verður ásett, at miðal avgreiðingarvirðið fyri lodnu er fyri tíðarskeiðið 1. mai árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, og til og við 30. apríl sama ár, veiðigjaldið skal áleggjast. Veiðigjaldið fellur til gjaldingar í einum 15. juli fyri alla veiðu landað í hesum tíðarskeiði.

Hækking av veiðigjaldi í 2026
8-ára rættindi, sum vórðu seld á uppboði í 2018 og 2019 ganga út í 2026 og 2027. Av tí at uppboðssølugjaldið er hægri enn veiðigjaldið, sum er ásett eftir veiðigjaldslógini, fara árligu inntøkurnar til landið at minka við á leið 40 mió. kr. frá 2027 og fram. Tí verður lagt upp til, at veiðigjaldið hækkar í 2026, soleiðis at allar talvurnar hækka við tveimum 2%-stigum.

Um veiðan ikki kann seljast vegna ótilætlaða hending
Vinnan hevur ynskt, at atlit verður tikið til ta støðu, at veiða fer fyri skeytið vegna ótilætlaða hending t.d. havarí ella um olja kemur í tangan, og veiðan av hesi orsøk ikki kann seljast. Við uppskotinum verður ásett, at veiðigjald ikki skal rindast av veiðu, sum ikki kann seljast vegna ótilætlaða hending, sum fer fram áðrenn avreitt verður.

Inntøkur til kommunurnar
Skotið verður upp, at 2% av veiðigjaldinum fellur til kommunurnar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er sent til ummælis á hoyringarportalinum og harumframt sent til Føroya Reiðarafelag, Felagið Nótaskip, Vørn, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Kommunufelagið.

Uppskotið varð lagt til hoyringar tann 9. mars 2023. Freistin at koma við viðmerkingum var 16. mars 2023.

Hoyringarpartarnir hava víst á, at freistin at svara er ov stutt.

Fíggjarmálaráðið er samt í hesum, men tað er ikki møguligt leingja freistina, um broytingin skal hava gildi fyri veiðu landað frá 1. august og árið út. Lógaruppskotið ávirkar ikki veiðigjald fyri veiðu landað fyri 1. august 2023.

Hoyringarsvar eru komin frá:

- Føroya Reiðarafelag
- Framherja Sp/f
- JFK Trol P/F
- Felagnum Línuskip
- Jupiter P/F
- Felagnum Nótaskip
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Vørn
- Kommunufelagnum
- Fuglafjarðar kommunu
- Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
- Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum

Ummælisskjal og ummæli eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur avleiðingar fyri inntøkurnar hjá landinum. Fyri 2023 er tað serliga veiðigjaldið fyri makrel, sum fer at hækka, bæði tí at veiðigjaldið hækkar og undantakið fyri heimaflotan fellur burtur. Harafturat kemur nakað inn afturat, tí tað eftir lógarbroytingina eisini verður goldið fyri heystgýtandi sild. Samlaða meirinntøkan av broyttu gjøldunum verður mett til 75 mió. kr. harav góðar 40 mió. kr. stava frá, at undantakið fyri heimaflotan verður strikað. Fyri árini frameftir er veiðigjaldsinntøkan tongd at bæði kvotum og prísum, sum kunnu sveiggja nógv.

Um støði verður tikið í miðal nøgd og prísum seinastu fimm árini, høvdu gjøld og árligar meirinntøkur sæð soleiðis út:

	avgjaldstons	miðalprísur	veiðigjald	nýtt veiðigjald	meirinntøka (mió. kr.)
makrelur	80.000	7,25	1,38	1,67	23.200
norðhavssild	110.000	4,50	0,81	0,81	-
heystgýtandi sild	10.000	4,50	0,00	0,81	8.100
svartkjaftur	290.000	2,10	0,34	0,36	6.090
lodna	10.000	5,00	0,00	0,95	9.500
botnfiskur	25.000	19,00	0,95	1,09	3.563
tilsamans					50.453

Afturat tí skulu koma góðar 30 mió. kr. frá tí at undantakið fyri at gjalda veiðigjald dettur burtur. Í alt verður mett, at árliga meirinntøkan í veiðigjaldi verður um 60-100 mió. kr.

Her skal havast í huga, at síðstu árini hevur eingin semja verið um uppsjóvarfiskin millum strandarlondini, og kvoturnar hava tískil verið høgar. Høgt útboð og avmarkingar í mun til fiskiskap hava tó hildið prísin niðri í hesum tíðarskeiðinum.

Avleiddar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Í tann mun, at veiðigjaldið minkar um skattskyldugu inntøkuna hjá feløgunum og manning, minka inntøkurnar frá partafelagskatti.

Kommunurnar fáa 30% av partafelagskattinum, og tískil er beinleiðis ávirkanin á kommunurnar. Fyri tær kommunur, har fiskivinna frá Barentshavinum og uppsjóvarfiski er, kann roknast við minni í partafelagsskatti. Harafturat kann roknast við, at veiðigjaldið ávirkar hýrur, og hevur hetta við sær, at persónsskatturin til land og kommunur minkar. Minkingin tilsamans verður mett til 15-30 mió. kr., harav landið eigur bróðurpartin.

Í uppskotinum er ásett, at 2% av veiðigjøldunum fella til kommunurnar. Inntøkan, sum fellur til kommunurnar, verður mett til umleið 8-10 mió. kr. árliga.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Veiðigjaldið verður ásett eftir somu mannagongd sum í galdandi lóggávu, tað vil siga, at neyðugt er at rokna út miðalprísin fyri feskan óviðgjørdan makrel, sild og svartkjaft og finna fram miðalprísin fyri tosk, sum er seldur á almennum uppboði í Føroyum, umroknað til rundan fisk. Hesum tekur Vørn sær av.

Tað, at sama veiðigjald skal rindast fyri alla sild, lættir munandi um fyrisitingina hjá Vørn, tí tað kann vera trupult at skilja ímillum hvat er norðhavssild og hvat er heystgýtandi sild.

Veiðigjald verður goldið fyri lodnu, sum áður ikki hevur verið fevnd av hesi lóg.

Eins og eftir galdandi lóggávu er neyðugt at áleggja góðkendum uppboðssølum av fiski at koma við upplýsingum, sum skulu til at rokna út miðalprís fyri rundan tosk.

Veiðigjaldið verður eftir hesi løgtingslóg kravt inn á sama hátt sum í dag, við at Vørn krevur inn gjald fyri hvørt fiskað kilo.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna, tí at løgtingslógin ásetir, hvat skal gjaldast fyri fiskirættindini. Gjøldini eru hægri enn tað, sum rindað verður fyri í dag.

Tað, at gjøldini hækka, so at størri partur av tilfeingisrentuni fellur til landið, ger, at kravið til vinnuna um effektivitet og góð veiðitól økist. So hóast uppskotið viðførir ein fíggjarligan kostnað fyri vinnuna, vil tað ikki steðga vinnuni í at gera skilagóðar íløgur. Heldur tvørturímóti.

Undantakið frá skylduni at rinda veiðigjald fyri kvotur latnar fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært §§ 18 og 19 í løgtingslóg um sjófeingi ella fiskiførum við fiskiloyvi til fiskiskap við gørnum eftir havtasku og svartkalva á føroysku landleiðunum verður strikað. Fíggjarligi stuðulin til hesar skipabólkar verður við hesum tikin burtur, og veiðigjald verður álagt fyri alla veiðu av makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum. Veiðigjald verður somuleiðis lagt á lodnu, sum higartil ikki hevur verið fevnd av lógini.

Veiðigjaldið verður sambært lógaruppskotinum kravt inn á sama hátt, sum í dag. Tí hevur lógin ongar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Undantakið frá veiðigjaldinum fyri kvotur latnar fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært §§ 18 og 19 í løgtingslóg um sjófeingi ella fiskiførum við fiskiloyvi til fiskiskap við gørnum eftir havtasku og svartkalva á føroysku landleiðunum verður strikað. Við at avtaka hesa serligu stuðulsskipan, verður stovnsrøktin, alt annað líka, meira burðardygg, tí verandi stuðulsskipan gevur ein yvirkapasitet í heimaflotanum og ger sítt til, at stovnsrøktin framhaldandi ikki virkar nóg væl.

Ongar árinsmetingar eru gjørdar um avleiðingarnar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum. Yvirskipað ber til at siga, at tey øki í landinum, sum í

dag hava størsta ágóðan av verandi býti av serstøku rættindunum, eisini merkja størstu avleiðingina av broytingunum. Talan er tó ikki um avleiðing, sum beinleiðis er tongd at ávísum øki.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Eingin broyting er í mun til verandi lóggávu.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið ásetir veiðigjald fyri hvørt fiskað kilo av makreli, norðhavssild, lodnu, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum og við Svalbard sambært ásetingunum í §§ 9, 9a-9c og skjali 1, 1A og 1B.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Eingin broyting er í mun til verandi lóggávu.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Galdandi løgtingslóg áleggur landsstýrismanninum í kunngerð at áseta veiðigjøldini. Við hesum lógaruppskoti verður harumframt heimilað landsstýrismanninum at áseta í kunngerð, hvussu partar av inntøkunum frá veiðigjaldinum verða býttir millum kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1
Umframt veiðigjald av teimum fiskasløgum, sum eru fevnd av galdandi lóg, verður veiðigjald eftir lógaruppskotinum rindað fyri veiðu av lodnu og heystgýtandi sild.

Til § 1, nr. 2
Undantakið frá skylduni at rinda veiðigjald fyri kvotur latnar fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært §§ 18 og 19 í løgtingslóg um sjófeingi - sonevndi heimaflotin - verður strikað. Undantakið fyri fiskifør við fiskiloyvi til fiskiskap við gørnum eftir havtasku og svartkalva á føroysku landleiðunum verður somuleiðis strikað.

Fíggjarligi stuðulin til heimaflotan, sum verður latin við kvotum, verður við hesum tikin burtur. Veiðigjald verður við lógaruppskotinum álagt fyri alla veiðu av makreli, sild, lodnu og svartkjafti og á veiðu av botnfiski í Barentshavinum. Skipini rinda hereftir sama gjald fyri sama fiskaslag.

Til § 1, nr. 3
Í galdandi lóg er heystgýtandi sild ikki fevnd av veiðigjaldi. Veiðigjald verður eftir lógaruppskostinum rindað bæði fyri norðhavssild og heystgýtandi sild. Sild verður í § 3, stk. 1, nr. 2 allýst sum norðhavssild og heystgýtandi sild.

Til § 1, nr. 4 og 5
§ 5 og § 7, stk. 2, 2. pkt. verða broytt sum avleiðing av, at heystgýtandi sild og lodna eftir lógaruppskotinum eru fevndar av veiðigjaldi. Eingin broyting er í innihaldinum.

Til § 1, nr. 6
§ 9, stk. 1. Veiðigjaldið verður hækkað stigvíst. Hetta verður gjørt í skjali 1A og 1B.

§ 9, stk. 2 verður broytt sum avleiðing av, at heystgýtandi sild og lodna eftir lógaruppskotinum eru fevndar av veiðigjaldinum. Eingin broyting er í innihaldinum, og miðal avreiðingarvirðið verður roknað eftir somu reglum sum í galdandi lóg.

§ 9, stk. 3. Eingin broyting er í innihaldinum.

§ 9 stk. 4. Lodna verður vanliga fiskað í januar, februar og mars, og ofta verður kvotan hækkað bæði í januar og februar. Hesi serligu viðurskifti hava við sær, at stór sveiggj kunnu verða bæði í kvotu og prísi. Vanligu reglurnar um áseting av veiðigjaldi út frá miðalprísum árið fyri eru tí ikki so væl egnaðar til lodnu. Tí verður ásett, at miðal avgreiðingarvirðið fyri lodnu er fyri tíðarskeiðið 1. mai árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, og til og við 30. apríl sama ár, veiðigjaldið skal áleggjast. Veiðigjaldið fellur til gjaldingar í einum 15. juli fyri alla veiðu landað í hesum tíðarskeiði. Um innkrevjing sí viðmerkingarnar til § 1, nr. 9.

Til § 1, nr. 7
Veiðigjaldið verður hækkað stigvíst. Hetta verður gjørt í skjali 1A og 1B.

§ 9a. Fyri veiðu av makreli, norðhavssild og svartkjafti, ið er landað frá 1. august 2022 til og við 31. juli 2023, er veiðigjaldið óbroytt í mun til galdandi lóg. Heystgýtandi sildin er ikki fevnd av veiðigjaldi eftir hesi áseting. Veiðigjald á heystgýtandi sild verður álagt eftir 1. august 2023. Sí viðmerking niðanfyri til §§ 9b og 9c.

Fyri veiðu av botnfiski í Barentshavinum, ið er landað frá 1. januar 2022 til og við 31. desember 2023, er veiðigjaldið somuleiðis óbroytt í mun til galdandi lóg. Veiðigjaldið verður ásett í fylgiskjali 1, sum er óbroytt.

§§ 9 b og 9 c. Fyri veiðu av makreli, sild og svartkjafti landað frá 1. august 2023 verður veiðigjaldið meira stigvaksandi, soleiðis at veiðigjaldið hækkar skjótari, tá prísurin hækkar, og somuleiðis lækkar skjótari, tá prísurin lækkar. Sild eftir hesi áseting er bæði norðhavssild og heystgýtandi sild.

Fyri makrel, sild og svartkjaft broytist stigin fyri veiðigjaldið tann 1. august 2023 og aftur tann 1. august 2026. Veiðigjald skal harumframt frá 1. august 2023 rindast av lodnu eftir somu talvu sum fyri makrel og sild. Veiðigjaldið verður ásett í skjali 1A og 1B sum prosent av miðal avreiðingarvirðinum sambært § 9, stk. 4.

Fyri botnfisk í Barentshavninum hækkar veiðigjaldið tann 1. januar 2024 og aftur tann 1. januar 2026. Veiðigjaldið verður ásett í skjali 1A og 1B sum prosent av miðal avreiðingarvirðinum sambært § 9, stk. 3.

§ 9 d. Um veiða ikki kann seljast vegna ótilætlaða hending, sum fer fram áðrenn avreitt verður t.d. havarí ella um olja kemur í tangan, og veiðan av hesi orsøk ikki kann seljast, verður veiðigjald ikki kravt. Hetta hevur við sær, at Vørn skal hava skjalprógv fyri, at veiðan ikki kann seljast. Tað er ikki nóg mikið, at veiðan bert kann seljast undir marknaðarvirði.

Til § 1, nr. 8
§ 11 verður broytt sum avleiðing av, at heystgýtandi sild og lodna eftir lógaruppskotinum eru fevndar av veiðigjaldi. Eingin broyting er í innihaldinum.

Til § 1, nr. 9
§ 12 Lodna verður vanliga fiskað í januar, februar og mars og ofta verður kvotan hækkað bæði í januar og februar. Hesi serligu viðurskifti hava við sær, at stór sveiggja kunnu verða bæði í kvotu og prísi í hesum tíðarskeiði. Tí verður miðal avreiðingarvirðið fyri lodnu ikki ásett eftir miðalprísinum árið fyri, og til ber ikki, at veiðigjaldið fellur til gjaldingar so hvørt.

Veiðigjald fyri lodnu, ið er landað 1. mai árið frammanundan og til og við 30. apríl, fellur til gjaldingar 15. juli fyri alla veiðu, ið er landað í hesum tíðarskeiði.

Til § 1, nr. 10
§ 12 a. 2% av veiðigjaldinum fellur til kommunurnar, og landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um, hvussu inntøkurnar frá gjaldinum verða býttar millum kommunurnar. Býtið verður ásett við støði í eini útrokning av lækkingini í inntøkuni frá partafelagsskatti í teimum kommunum, sum fáa lægri partafelagsskatt vegna broyting í

veiðigjøldum í hesum lógaruppskoti. Meginreglurnar í kap. 4 og 5 í skattalógini um tilhalds- og atvinnukommunur verða nýttar sum ein treyt í býtinum.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Eftir uppskotinum kemur henda løgtingslóg í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Tó kemur § 12a, sum ásetur, at kommunurnar fáa ein part av veiðigjaldinum, í gildi 1. januar 2024.

Fíggjarmálaráðið, 28.03.2023.

Ruth Vang
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælisskjal
Fylgiskjal 3: Føroya Reiðarafelag
Fylgiskjal 4: Framherji Sp/f
Fylgiskjal 5: JFK Trol P/F
Fylgiskjal 6: Felagið Línuskip
Fylgiskjal 7: Jupiter P/F
Fylgiskjal 8: Felagið Nótaskip
Fylgiskjal 9: Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Fylgiskjal 10: Vørn
Fylgiskjal 11: Kommunufelagið
Fylgiskjal 12: Fuglafjarðar kommuna
Fylgiskjal 13: Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Fylgiskjal 14: Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið